

**Dátueftirlitið**

Ársfrágreiðing 2009

101010

# INNIHALD


| | | |
|---|---|---|
| **1. Fororð** | | 5 |
| **2. Dátueftirlitið, Ráðið og skrivstovan** | | 6 |
| 2.1. | Játtanin á løgtingsfíggjarlógini | 6 |
| 2.2. | Lógargrundarlagið hjá Dátueftirlitinum | 7 |
| 2.3. | Uppgávurnar hjá Dátueftirlitinum | 7 |
| 2.3.1. | Eftirlit og heimildir | 7 |
| **3. Virksemi í árinum 2009** | | 9 |
| 3.1. | Plakatkappingin | 10 |
| 3.2. | Vertir fyri norðurlendskum fundi | 10 |
| 3.3. | Gallup kanning um vakmyndatól | 11 |
| 3.4. | Filmur | 11 |
| 3.5. | Missjón, visjón og virðir | 11 |
| 3.6. | Landsgrannskoðanin á Dátueftirlitinum | 11 |
| 3.7. | KT-trygd á Dátueftirlitinum | 12 |
| 3.8. | Eftirlit | 12 |
| 3.9. | Hagtøl | 12 |
| 3.10. | Munnligir fyrispurningar | 14 |
| 3.11. | Loyvi og fráboðanir | 15 |
| 3.11.1. | Loyvi til verkætlanir | 16 |
| 3.11.2. | Verkætlan: Kanning um sambandið millum sáðgóðsku og t.d. PCB-nøgdir í blóðinum hjá einum bólki av 22 ára gomlum føroyskum monnum | 16 |
| 3.11.3. | Verkætlan: Kanning av livikorunum hjá fólkapensjónistum | 16 |
| 3.11.4. | Verkætlan: Trivnaðarkanning av starvsfólki á dagstovnum í Føroyum | 17 |
| 3.11.5. | Verkætlan: Altjóða kanning av glykogen goymslubreki Typu III | 17 |
| 3.11.6. | Serritgerð: Um inklusión (at vera við í bólkinum) – kanningin verður gjørd í samband við serritgerð á Danmarks Pædagogiske Universitet | 17 |
| 3.11.7. | Verkætlan: Antimicrobial resistance in Streptococcus pneumoniae, Streptococcus pyogenese o.s.fr. | 17 |
| 3.11.8. | Aðrar verkætlanir, sum ikki hava kravt loyvi frá Dátueftirlitinum | 18 |
| 3.11.9. | Ílegusavnið (8 fráboðaðar granskingarverkætlanir) | 18 |
| 3.12. | Hoyringar | 18 |
| 3.12.1. | Lógaruppskot | 18 |
| 3.12.2. | Kunngerðir | 19 |
| 3.12.3. | KT-politikkur | 19 |
| **4. Ávís útvald mál í 2009** | | 21 |
| 4.1 | Ymisk mál | 21 |
| 4.1.1 | Hagtøl fyri arbeiðsloysi í Føroyum | 21 |
| 4.1.2. | Internetrættindi hjá starvsfólki (Facebook) | 21 |
| 4.1.3. | Handfaring av upplýsingum, tá persónur er deyður | 21 |
| 4.1.4. | Vakmyndatól á bústovni | 22 |
| 4.1.5. | Sporing av stolnum telefonum | 22 |
| 4.1.6. | Betri Pensjón – útflýggjan av p-tølum hjá limunum í Føroya Lærarafelag | 23 |
| 4.1.7. | GPS (Global Positioning System) | 23 |
| 4.2. | Mál tikin upp av egnum ávum | 24 |
| 4.2.1. | Myndir á heimasíðum | 24 |
| 4.2.2. | Sjónbandaupptøkur í frítíðarskúla | 26 |
| **5. Altjóða samstarv** | | 28 |
| 5.1. | Norðurlond | 28 |
| **6. Eftirlit í 2009** | | 29 |
| 6.1. | Eftirlit viðvíkjandi vakmyndatólum | 29 |
| 6.2. | Eftirlit hjá Ternubúðini | 29 |
| 6.3. | Eftirlit hjá P/f Poul Michelsen | 29 |
| 6.4. | Eftirlit hjá Strandfaraskipum Landsins – Smyril | 29 |
| 6.5. | Eftirlit hjá Idé Møblum | 30 |
| 6.6. | Eftirlit á Landssjúkrahúsinum | 30 |

101010

Við hesum letur Dátueftirlitið ársfrágreiðing sína fyri 2009 úr hondum. Ársfrágreiðing verður skrivað sbrt. § 37, nr. 8 í persónsupplýsingarlógini og er ætlað almenninginum.

# FORORÐ 2009

Í ársfrágreiðingini er ein lýsing av virkseminum hjá Dátueftirlitinum í árinum 2009. Eins og undanfarna ár hevur Dátueftirlitið merkt ein øktan áhuga fyri økinum, og talið av innkomnum málum vaks í 2009 við 38%.

Dátueftirlitið var í 2009 vertur fyri felags norðurlendskum málsviðgerafundi, har umboð frá norðurlendsku Dátueftirlitunum árliga hittast at kjakast um ymisk evni. Á fundinum, sum varð hildin í Tórshavn, vóru m.a. evnini sosial netverk, eygleiðing við GPS og talgildar sjúklingajournalir umrødd.

Aftur í ár hevur eitt av fokusøkjunum hjá Dátueftirlitinum verið børn og ung á internetinum, og Dátueftirlitið hevur eins og undanfarna ár vitjað á fleiri miðnámsskúlum kring landið. Avtala er somuleiðis gjørd við fleiri skúlar um árliga vitjan av Dátueftirlitinum við skúlaársbyrjan.

Dátueftirlitið hevur saman við Miðlaráðnum gjørt ein film fyri at ávara tey ungu um upplýsingar og myndir á netinum. Filmurin vísur, at tað t.d. í samband við starvssetan kann hava týdning, hvørjar upplýsingar, myndir v.m. ein arbeiðsgevari kann finna um viðkomandi umsøkjara á netinum.

Fyri at varpa ljós á eygleiðing á internetinum, skipaði Dátueftirlitið í 2009 fyri plakatkapping millum tannáringar. Nógv uppskot komu inn og ein dómsnevnd valdi vinnandi uppskotið.

Dátueftirlitið skipaði í 2009 fyri eini Gallup kanning um eygleiðing. Spurt var bæði um eygleiðing við vakmyndatóli og um aðra eygleiðing, so sum at arbeiðsgevari lesur teldupost hjá starvsfólki. Kanningin gav eina mynd av, hvussu fatanin er millum fólk, og hvussu ymisk fatanin er hjá teimum ungu í mun til tey eldru.

Eftirlit er nú vorðið ein integreraður partur av arbeiðinum hjá Dátueftirlitinum, og í 2009 var Dátueftirlitið á eftirliti á 5 støðum. Eitt av hesum var á Landssjúkrahúsinum, har trygdin í THS skipanini varð kannað. Komið var fram til, at ymisk viðurskifti ikki vóru nøktandi, og hevur Heilsumálaráðið, sum er dátuábyrgdari av skipanini, fingið boð um at fáa hesi viðurskifti í rætt lag.

Væntað varð, at ES í 2009 fór at góðkenna Føroyar sum eitt trygt 3. land í persónsupplýsingarhøpi, men bíðað verður framvegis eftir hesum máli.

Tórshavn, 15. mars 2010

Turið Debes Hentze
*Forkvinna í Dáturáðnum*

Ingunn Eiriksdóttir
*Stjóri í Dátueftirlitinum*

# 2 Dátueftirlitið

Dátueftirlitið er ein óheftur fyrisitingarligur myndugleiki, sum er skipaður undir Innlendismálaráðnum. Dátueftirlitið hevur fíggjarligt tilknýti til Innlendismálaráðið, men er í virksemi sínum óheft av Innlendismálaráðnum.

Dátueftirlitið umsitur Løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum, sum broytt við Ll. nr. 24 frá 17. mai 2004. Lógin verður vanliga nevnd persónsupplýsingarlógin.

Dátueftirlitið er hægsti fyrisitingarligi myndugleiki í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum, og avgerðirnar hjá Dátueftirlitinum sambært lógini eru fyrisitingarliga endaligar.

Dátueftirlitið hevur virkað síðan 1. januar 2002, tá persónsupplýsingarlógin kom í gildi. Dátueftirlitið er skipað við Dáturáði, valt av landsstýrismanninum í lógarmálum, og skrivstovu. Limirnir í Dáturáðnum eru persónliga valdir, og formaðurin skal vera løgfrøðingur. Limirnir verða valdir fyri fýra ár, og somuleiðis verða varalimir valdir fyri fýra ár.



**Limirnir í Dáturáðnum 2008-2012:**
Landsstýriskvinnan í innlendismálum valdi tann 1. november 2008 somu limir í Dáturáðið eitt valskeið afturat. Samstundis eru nýggir varalimir valdir.

**Í Dáturáðnum eru:**
Turið Debes Hentze, advokatur, forkvinna.
*Varalimur Aibritt á Plógv, løgfrøðingur.*
Bjarni Wilhelm, fíggjarleiðari.
*Varalimur Annika Sølvará, stjóri.*
Óli M. Hansen, løgfrøðingur.
*Varalimur Regin W. Dalsgaard, stjóri.*

Valskeiðið hjá Dáturáðnum er 4 ár og gongur út 1. november 2012.

**Skrivstovan:**
Stovnurin er skipaður við einum stjóra, einum løgfrøðingi og einum skrivara.

Dátueftirlitið heldur til í egnum skrivstovuhølum, bústaðurin er Reyngøta 33, Tinganes.

## 2.1. JÁTTANIN Á LØGTINGSFÍGGJARLÓGINI

Játtanin hjá Dátueftirlitinum á løgtingsfíggjarlógini í 2009 var: kr. 2.000.000.

Niðanfyri er ein útgreining av fíggjarjáttanini hjá Dátueftirlitinum fyri árini 2007-2009.

## 2.2. LÓGARGRUNDARLAGIÐ HJÁ DÁTUEFTIRLITINUM

**Í 2009 vóru hesar reglur galdandi:**

- Løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum, sum broytt við Løgtingslóg nr. 24 frá 17. mai 2004, (Persónsupplýsingarlógin).
- Kunngerð nr. 28 frá 27. februar 2003 um trygd í sambandi við viðgerð av persónsupplýsingum, (Trygdarkunngerðin).
- Kunngerð nr. 33 frá 11. apríl 2005 um at flyta persónsupplýsingar av landinum uttan loyvi frá Dátueftirlitinum.
- Kunngerð nr. 2 frá 25. februar 2004 um undantøk frá reglunum um viðgerðarloyvi.
- Kunngerð nr. 30 frá 11. apríl 2005 um fráboðanarskyldu til Dátueftirlitið, sum broytt við kunngerð nr. 70 frá 2. juli 2007.
- Kunngerð nr. 31 frá 11. apríl 2005 um fráboðanarskyldu til Dátueftirlitið, sum broytt við kunngerð nr. 71 frá 2. juli 2007.
- Kunngerð nr. 32 frá 11. apríl 2005 um fráboðanarskyldu til Dátueftirlitið, sum broytt við kunngerð nr. 72 frá 2. juli 2007.
- Reglugerð fyri Dáturáðið, dagfest 14. juni 2007.
- Innanhýsis roknskaparreglugerð, góðkend av Innlendismálaráðnum tann 18. juni 2008.

## 2.3. UPPGÁVAN HJÁ DÁTUEFTIRLITINUM

Uppgávan hjá Dátueftirlitinum er at umsita persónsupplýsingarlógina. Sambært § 37 í lógini skal Dátueftirlitið:

- Av sínum eintingum ella eftir klagu frá skrásetta ansa eftir, at viðgerð av persónsupplýsingum bert fer fram í samsvari við lógina og tær reglur, sum ásettar eru sambært lógini,
- viðgera fráboðanir og umsóknir um loyvi og áleggja treytir sambært lógarheimild,
- hava ein skipaðan almennan lista yvir allar fráboðanir og loyvir sambært lógini,
- geva ummæli til ætlaða lóggávu, sum viðvíkur persónsupplýsingum,
- gera kanningar, har persónsupplýsingar verða viðgjørdar,
- vegleiða privatum og tí almenna í ivamálum og virka fyri, at upplýsingar verða viðgjørdar sam bært góðum dátuviðgerðarsiði,
- fylgja við í og kunna um gongdina í viðgerðini av persónsupplýsingum her á landi og uttanlands, og
- gera ársfrágreiðing.

Dátueftirlitið

### 2.3.1. Eftirlit og heimildir

Dátueftirlitið er ein eftirlitsmyndugleiki, sum skal tryggja, at persónsupplýsingarlógin verður hildin, og Dátueftirlitið hevur víðar heimildir til tess at tryggja, at reglurnar í lógini verða hildnar.

Dátueftirlitið hevur heimild til at gera kanningar á staðnum, og hevur til eina og hvørja tíð uttan dómsskurð, atgongd til øll høli, haðani persónsupplýsingar verða viðgjørdar ella goymdar, og til øll høli har persónsupplýsingarnar ella teknisk hjálparamboð verða goymd ella nýtt.

Dátueftirlitið kann harumframt m.a. áleggja einum dátuábyrgdara at fremja tøknilig og fyrisitingarlig trygdartiltøk, kann nokta einum dátuábyrgdara at nýta ávísan framferðarhátt og kann krevja, at dátuábyrgdari steðgar viðgerð, sum er brot á lógina.

Í 2008 var játtanin hjá Dátueftirlitinum hækkað, so at Dátueftirlitið kann fremja tekniskt eftirlit við uttanhýsis konsulentum. Játtanin til eftirlit var tann sama í 2009 sum í 2008. Dátueftirlitið var í 2009 á eftirliti á Landssjúkrahúsinum, umborð á Smyrli, í Ternubúðini, hjá Idé Møblum og hjá P/F Poul Michelsen Heilsølu, sí pkt. 6 í ársfrágreiðingini.

**Fíggjarjáttanin hjá Dátueftirlitinum fyri 2007 - 2009**

| *Sundurgreinað ætlan*<br>Tús. kr. | **2007<br>J+EYJ** | **2008<br>J** | **2009<br>J** |
|---|---|---|---|
| **Nettoútreiðslujáttan** | **1.707** | **1.890** | **2.000** |
| Lønir o.a. | 1.400 | 1.453 | 1.590 |
| Keyp av vørum og tænastum | 168 | 298 | 298 |
| Keyp av útbúnaði, netto | 102 | 102 | 102 |
| Leiga, viðlíkahald og skattur | 37 | 37 | 10 |

:// Dátueftirlitið virkar á einum øki, har tøkniliga menningin gongur skjótt fyri seg og nýggir trupulleikar og øki stinga seg javnan upp.

1o1o1o

# 3 Virksemi í árinum 2009



Dátueftirlitið hevur í 2009 m.a. viðgjørt hesi sløg av málum:

- viðgjørt loyvir og fráboðanir
- vegleitt og ráðgivið almennum myndugleikum, fyritøkum og privatpersónum
- viðgjørt klagur frá persónum um ymiska viðgerð av persónsupplýsingum
- framt eftirlitsvitjanir
- vitjað og hildið framløgur fyri fólkaskúlum og miðnámsskúlum kring landið
- ummælt uppskot til nýggja lóggávu
- tikið mál upp av egnum ávum
- luttikið í norðurlendskum samstarvi
- samskift við ymiskar myndugleikar í samband við 3. lands góðkenningina frá ES
- skipa fyri plakatkapping fyri tannáringar
- framleitt ein film saman við Miðlaráðnum
- gjørt kanning um vakmyndatól saman við Gallup Føroyar.

Dátueftirlitið virkar á einum øki, har tøkniliga menningin gongur skjótt fyri seg, og nýggir trupulleikar og øki stinga seg javnan upp. Somuleiðis er lóggávan lutfallsliga nýggj, og tískil er neyðugt at menna nýggjan praksis á økinum, og í hesum sambandi er neyðugt at fylgja væl við gongdini í grannalondunum.

Uppgávurnar hjá Dátueftirlitinum eru nógvar og málsviðgerðin er fjøltáttað. Harumframt er økið í vøkstri og støðugari tøkniligari menning, og tí er stórur tørvur á, at Dátueftirlitið við upplýsing og vegleiðing virkar fyri, at persónsupplýsingar verða viðgjørdar sambært góðum dátuviðgerðarsiði.

Fyrispurningar kunnu vera á nógvum ymiskum økjum, men til tíðir eru afturvendandi fyrispurningar. Afturvendandi fyrispurningar hava í 2009 serliga verið um hesi evni:

- P-talið,
- GPS nýtslu,
- Facebook og onnur sosial netverk,
- innlit,
- skráseting av upplýsingum ísbv. lántøku og skráseting í RKI
- samankoyring av ymiskum skipanum,
- bandaðar telefonsamrøður,
- telefonskráseting,
- viðurskiftini millum arbeiðsgevarar og starvsfólk í mun til internet- og teldupostanýtslu,
- loyvi til verkætlanir og ymiskar nøgdsemis- og heilsukanningar,
- kt-trygd,
- vakmyndatól,
- vevmyndatól

## 3.1. PLAKATKAPPING

Dátueftirlitið gjørdi í 2009 av at varpa ljós á eygleiðing og skipaði í hesum sambandi fyri plakatkapping fyri tannáringar. Evnið til kappingina var eygleiðing í breiðum týdningi, og vísti Dátueftirlitið á, at talan kundi millum annað vera um:

- Eygleiðing við vakmyndatóli
- Arbeiðsgevarin ella lærarin sneytar í tínum telduposti
- Foreldur halda eyga við børnum o.s.fr.

Endamálið við plakatkappingini var bæði at kveikja áhugan millum ung fyri evninum eygleiðing og somuleiðis at finna eina plakat, sum frameftir kundi vera ímyndin av tiltøkum, sum Dátueftirlitið skipar fyri í hesum sambandi.

**Kappingarreglurnar vóru soljóðandi:**
"Ung frá 13 til 19 ár kunnu senda inn plakatir, sum á ein ella annan hátt ímynda eygleiðing. Luttakararnir hava listarligt frælsi til at vísa evnið fram. Plakatin kann sostatt bæði vera telduviðgjørd ella teknað við hond."







Tíðarfreistin varð sett til 16. oktober 2009 og varð dómsnevnd setta at velja bestu plakatina millum øll innkomin uppskot. Í dómsnevndini sótu: Turið Debes Hentze, umboð fyri Dáturáðið, Niels Arge Galán, kreativur leiðari og Sunnevá Háberg Eysturstein, blaðfólk og samskipari.

Vinnarin fekk eina iPhone 3GS.

Inn komu 18 uppskot og tann 5. november 2009 valdi dómsnevndin 16 ára gamla Óðinn Katrinarson Johansen av Velbastað, sum vinnara av kappingini.

Vinnaraplakatin hjá Óðinni Katrinarsyni Johansen sæst niðanfyri til høgru.

**Dómsnevndin hevði hesa grundgeving:**
"Vinnandi uppskotið er tað, sum rakar málbólkin – ungdómin – best. Við einum málburði og stíli, sum møtir teimum ungu, har tey eru, verður tosað til teirra í eygnahædd. Plakatin vísir, hvussu útstillað vit kunnu vera á netinum. Í dag eru myndatól allastaðni – bæði vakmyndatól, í telefonum og í teldum – og sannlíkindini fyri, at vit verða avmyndað í einari óhepnari støðu er stór. Myndirnar á skíggjanum vísa dømi úr heimasíðuni FailBlog.org, um júst hetta, at onnur leggja myndir um persónar og hendingar út til almenningin at síggja. Við einum formi og stíli, sum tey ungu kenna seg aftur í, lýsir vinnandi uppskotið á hugtakið eygleiðing á ein einfaldan og beinraknan hátt".

## 3.2. VERTIR FYRI NORÐURLENDSKUM FUNDI

Dátueftirlitið var í døgunum 2. til 4. juni 2009 vertur fyri norðurlendskum málsviðgerafundi. Hetta er fundur, sum verður hildin á hvørjum ári, har umboð fyri Føroyar, Finland, Noreg, Svøríki, Ísland og Danmark luttaka at umrøða ymisk viðurskifti, sum hava felags áhuga.

**Á fundinum í ár vóru hesi evni viðgjørd:**

- Talgildar sjúkrajournalir
- Sosial netverk, herundir Facebook, Arto o.o.

- Arbeiðsgevari hevur eftirlit við starvsfólki
- Eftirlit við vakmyndatóli og GPS
- Kunning um átak í Noregi um persónsvernd og kt-trygd í fólkaskúlanum.

## 3.3. GALLUP-KANNING

Dátueftirlitið fekk í oktober/november 2009 Gallup at gera eina kanning viðvíkjandi eygleiðing. Kanningin varð gjørd millum 500 fólk yvir 5 ár, og spurningarnir vóru t.d.:

*Heldur tú at tað skal vera loyvt at hava vakmyndatól inni í handlum, á matstovu, inni á einum skúla, á eini handilsgøtu?*
Her svaraðu 90% ja til at vakmyndatól var í handli, 39% ja til inni á matstovu, 45% inni á einum skúla og 71% á handilsgøtu

*Hvussu nógv vakmyndatól heldur tú eru í Føroyum?*
Her svaraðu 28% at tað vóru undir 200 vakmyndatól, 33% at tað vóru 201 til 500, 15% at tað vóru 501 til 1.000, 6% at tað vóu 1.001 til 2.000, 15% veit ikki

*Heldur tú at tað er í lagi at foreldur eygleiða samskiftið hjá sínum børnum, tá tey eru á internetinum?*
Her svaraðu 65% ja, 26% nei og 9% veit ikki

*Heldur tú at tað er í lagi at arbeiðsgevari kannar hvørjar heimasíður starvsfólk fara inn á?*
Her svaraðu 31% ja, 63% nei og 6% veit ikki

*Heldur tú at tað er í lagi at arbeiðsgevari lesur teldupost hjá starvsfólki?*
Her svaraðu 6% ja, 93% nei og 1% veit ikki
Úrslitið varð lagt fyri fjølmiðlarnar í desember 2009.

## 3.4. FILMUR

Dátueftirlitið og Miðlaráðið gjørdu í felag ein stuttan film um eygleiðing á netinum. Filmurin vísir, hvussu týdningarmikið tað er at ansa eftir, hvørjar myndir og sjónbond verða lagdar út á netið. Filmurin verður javnan vístur í Gevið Gætur í sjónvarpinum hjá Kringvarpi Føroya.

## 3.5. MISSIÓN, VISJÓN OG VIRÐIR

Dátueftirlitið arbeiddi í 2009 við at leggja missión, visjón og viðir fyri stovnin og úrsliti varð hetta:

**Missión:** Dátueftirlitið er ein óheftur fyrisitingarmyndugleiki, sum vegleiðir og ráðgevur borgarum, myndugleikum og fyritøkum um persónsupplýsingarlógina og hevur eftirlit við at persónsupplýsingarlógin verður hildin.

**Visjón:** Vit vilja vera ein vird rødd, sum sjónliga varpar ljós á persónsvernd og við upplýsing virkar fyri, at persónsupplýsingarlógin verður hildin.

**Virðir:** Dygd: Vit arbeiða óheft og professionelt. Vit veita eina dygdargóða tænastu, har dentur verður lagdur á eitt høgt fakligt støði

**Nýhugsan:** Vit nema okkum nýggja vitan og eru slóðbrótandi. Vit hava innlit í nýggja tøkni og eru við í altjóða rákinum

**Samstarv:** Vit vísa sínámillum virðing og álit og leggja dent á vegleiðing, ráðgeving og samskifti

**Vit taka ábyrgd:** Vit virka til tess at gagna føroyska samfelagnum og raðfesta uppgávur og tilfeingi við skynsemi

**Slagorð:** Dátueftirlitið verjir tínar persónsupplýsingar.

## 3.6. LANDSGRANNSKOÐANIN Á DÁTUEFTIRLITINUM

Tann 16. januar 2009 var Landsgrannskoðanin á Dátueftirlitinum og grannskoðaði roknskaparlønar-, KT- og onnur viðurskifti hjá stovninum. Grannskoðanin varð gjørd við støði í einum spurnablaði, sum Landsgrannskoðanin frammanundan hevði sent stovninum.

Frágreiðing frá grannskoðanini varð tann 15. apríl 2009 send landsstýriskvinnuni til viðmerkingar. Landsgrannskoðanin hevði ongar viðmerkingar til grannskoðaðu viðurskiftini á Dátueftirlitinum, men mælti til, at "skjalið EK 76 frá Gjaldstovuni

Virksemi í árinum 2009

verður nýtt." (Hetta er góðkenningarskjal fyri játtanarroknskapin).

## 3.7. KT-TRYGD

Dátueftirlitið arbeiddi í 2009 við Trygdarhondbókini fyri Dátueftirlitið, ið lýsir fysisku-, elektronisku og fyriskipanarligu trygdina á stovninum. Somuleiðis varð arbeitt við KT-trygdarpolitikkinum og váðametingini. KT-trygdarpolitikkurin vísir yvirskipaðu reglurnar fyri kunningartrygdina á Dátueftirlitinum. Virksemið hjá Dátueftirlitinum er í týðandi mun tengt at einum vælvirkandi KT-kervi og tíðarhóskandi KT-skipanum. Endamálið við trygdarpolitikkinum er at gera nýtsluna av kunningartøkni á Dátueftirlitinum trygga og álítandi.



## 3.8. EFTIRLIT

Dátueftirlitið framdi í 2009 eftirlit hjá 3 privatum fyritøkum í miðstaðarøkinum, umframt umborð á Smyrli og á Landssjúkrahúsinum. Eftirlitið varð fráboðað frammanundan.

Eftirlitið á teimum báðum privatu fyritøkunum snúðu seg um at kanna eftir, um reglurnar um vakmyndatól vóru hildnar, herundir fráboðanarskyldan, meðan eftirlitið umborð á Smyrli í stóran mun snúði seg um kt-trygd og um trygdina í samband við viðgerð av starvsfólkaupplýsingum umvegis vakmyndatól.

Eftirlitið varð gjørt av tveimum starvsfólkum á Dátueftirlitinum. Á eftirlitinum varð staðfest, at ymisk viðurskifti vóru ikki nøktandi, og fingu dátuábyrgdararnir boð um at gera ymisk teknisk og fyriskipanarlig tiltøk, sum skuldu tryggja, at reglurnar í persónupplýsingarlógini verða hildnar. Eftirlitsfrágreiðing er skrivað, og ein stuttur samandráttur av niðurstøðunum frá eftirlitunum er at finna undir pkt. 6 í hesi ársfrágreiðing. Eisini ber til at lesa frágreiðingina frá eftirlitunum í fullum líki á heimasíðuni hjá Dátueftirlitinum.

## 3.9. HAGTØL FYRI 2009

Upplýsingarnar í hesum partinum av ársfrágreiðingini eru grundaðar á skrásetingina av nýggjum málum í skjalaskránni hjá Dátueftirlitinum fyri 2009, og eru sostatt bara viðvíkjandi nýggjum málum. Ein stórur partur av málunum hjá Dátueftirlitinum er ofta framhald av gomlum málum, t.d. broytingar í givnum loyvum ella fráboðanum. Hesi mál eru ikki tikin við í hetta yvirlitið, sum bara snýr seg um mál, sum eru stovnað í 2009.

Í tíðarskeiðinum 1. janauar til 31. desember 2009 vóru *180 nýggj mál skrásett*, og hetta er ein vøkstur uppá 38% í mun til undanfarna ár.

**Á mynd 1 sæst**, hvussu nýstovnaðu málini í 2009 kunnu bólkast. Málini í 2009 kunnu í høvuðsheitum bólkast á henda hátt:

| | |
|---|---|
| Fráboðanir og givin loyvir (vakmyndatól, verkætlanir og telefonloyvir) | 74 |
| Norðurlendskt og Altjóða samstarv | 2 |
| Fyrispurningar frá almennum myndugleikum, kommunum og privatum | 52 |
| Lógaruppskot til hoyringar | 14 |
| Mál tikin upp av egnum ávum | 12 |
| Mál viðvíkjandi kt-trygd | 3 |
| Mál um innlit | 5 |
| Innanhýsis mál | 12 |
| Onnur mál | 6 |

**Á mynd 2** sæst, at tað í stóran mun eru almennir myndugleikar og fyritøkur, málini snúgva seg um.

Í 2009 vóru tølini hesi:

| | |
|---|---|
| Almennir myndugleikar (almennir myndugleikar og stovnar o.l.) | 50% |
| Fyritøkur (privatar fyritøkur, virkir, áhugabólkar o.l.) | 25% |
| Privatpersónar | 18% |
| Kommunur | 5% |
| Annað | 2% |

## Virksemi í árinum 2009

MYND 1 - Bólking av málum í 2009




MYND 2 - Málsbýti í mun til myndugleikar, fyritøkur o.t. 2008/2009



**Á mynd 3** sæst hvussu málini eru býtt upp á ymsu evnisbólkarnar

MYND 3 - MÁLSBÝTI Í MUN TIL EVNISBÓLKAR




Málini kunnu í høvuðsheitum býtast upp á hesar evnisbólkar í %

| | |
|---|---|
| Vakmyndatól | 20% |
| Gransking | 14% |
| Starvsfólkaviðurskifti | 4% |
| Kt-trygd | 9% |
| Innlit | 3% |
| Ummæli/hoyring | 8% |
| P-tøl | 6% |
| Telefonsamskifti | 6% |
| Eftirlit | 4% |
| Annað | 26% |

## 3.10. MUNNLIGIR FYRISPURNINGAR:

Talið av munnligum fyrispurningum í ár er vaksið við 18% í mun til í fjør.

Í 2007 byrjaði Dátueftirlitið at skráseta munnligar fyrispurningar, sum vóru avgreiddir umvegis telefon. Í hesum bólki eru bara skrásettir fyrispurningar, har borgari ella myndugleikar fáa beinleiðis vegleiðing umvegis telefon, og tað ikki snýr seg um samskifti í samband við verandi ella komandi mál.

**Á mynd 4 sæst,** hvussu teir munnligu fyrispurningarnir, sum vórðu avgreiddir í 2009, kunnu bólkast.

MYND 4 - MÁLSBÝTI Í MUN TIL MYNDUGLEIKAR, STOVNAR O.T. 2008/2009




| | |
|---|---|
| Almennir myndugleikar<br>(almennir myndugleikar og stovnar o.l.) | 19% |
| Fyritøkur<br>(privatar fyritøkur, virkir, áhugabólkar o.l.) | 36% |
| Privatpersónar | 34% |
| Kommunur | 8% |
| Advokatar | 3% |

***Almennir myndugleikar***
***(almennir myndugleikar og stovnar o.l.)***

Fyrispurningarnir í hesum bólki hava serliga verið um, nær og hvussu ymisk skráseting er loyvd, nær tað er loyvt at lata víðari viðkvæmar persónsupplýsingar sambært persónsupplýsingarlógini og um nýtslu av p-talinum. Somuleiðis hava fyrispurningar verið um at varðveita og almannakunngera ymiskar persónsupplýsingar. Eins og undanfarnu árini hava fyrispurningar verið um p-talið, um samkoyring av upplýsingum, um innlit, um reglurnar fyri heimaarbeiðspláss og ymisk starvsfólkaskráseting.

Fyrispurningarnir í sambandi við starvsfólkaskráseting hava ofta snúð seg um, hvussu ella undir hvørjum treytum ein arbeiðsgevari kann fáa atgongd til ymiskar upplýsingar úr teldupostskipanini hjá starvsfólki ella aðrar loggupplýsingar um starvsfólk. Í onkrum føri hava fyrispurningar verið um innlegg hjá starvsfólkum á kjaksíðum, og um nýtslu av sosialum netverkssíðum.

***Fyritøkur***
***(privatar fyritøkur, virkir, áhugabólkar o.l.)***
Flestu fyrispurningar frá privatum fyritøkum og arbeiðsgevarum hava í 2009 snúð seg um vakmyndatól, um nýtslu av p-talinum og um viðgerð av persónsupplýsingum í ymiskum starvsfólkaviðurskiftum, herundir um at eftirkanna heimasíðunýtslu hjá starvsfólki, um innlit í teldupostsamskifti hjá starvsfólki, um skráseting av telefonsamskifti hjá starvsfólkum, um nýtslu av sosialum netverkssíðum og um at flyta persónsupplýsingar av landinum. Eisini hava onkrir fyrispurningar hetta árið verið um, hvussu upplýsingar í teldupostskipanum o.ø. skulu handfarast, eftir at starvsfólk eru farin úr starvinum. Nakrir fyrispurningwar hava somuleiðis verið í samband við kredittupplýsingarvirksemi og um at fáa útgreinaða telefonrokning.

***Privatpersónar***
Rættiliga nógvir av fyrispurningunum frá privatpersónum hava verið frá starvsfólkum, sum hava spurt um reglur fyri, nær ein arbeiðsgevari kann kanna teldupost og heimasíðunýtslu hjá starvsfólki. Eisini hava onkrir fyrispurningar verið frá starvsfólki, sum eru søgd úr starvi, og sum vilja vita, hvussu arbeiðsgevarin kann nýta tilfar og upplýsingar, sum liggja í teldupostskipanini hjá viðkomandi. Fyrispurningar hava verið um skráseting av persónsupplýsingum í samband við høvuðsuppgávu ella phd-lestur, um ymiskar spurnarkanningar, um ættargransking, um happing á internetinum, um vakmyndatól, um GPS, um skráseting av upplýsingum í Arto og Facebook, og eins og undanfarnu ár hava nakrir fyrispurningar verið um nýtslu av p-talinum.

***Kommunur***
Fyrispurningarnir frá kommununum hava hetta árið serliga verið um vakmyndatól, vevmyndatól, nýtslu av GPS, p-talið, floksmyndir av børnum á internetinum, samankoyring av skipanum og Total View.

***Advokatar***
Fyrispurningarnir frá advokatum hava í 2009 serliga verið um innlit í arbeiðsrelateraðan teldupost hjá starvsfólkum, um víðarilatan av viðkvæmum upplýsingum, um nýtslu av kundadátubasum, um skráseting í RKI og um IP-adressur.

## 3.11. LOYVIR OG FRÁBOÐANIR
Ein av høvuðsuppgávunum hjá Dátueftirlitinum sambært § 37 í persónsupplýsingarlógini er at viðgera umsóknir um loyvir og fráboðanir.

***Viðgerðarloyvi:***
Eitt viðgerðarloyvi er eitt loyvi frá Dátueftirlitinum um, at viðkomandi stovnur, felag, persónur ella annar hevur loyvi at viðgera ávísar viðkvæmar persónsupplýsingar til eitt ávíst endamál og undir ávísum treytum. Viðgerðarloyvi eru oftast tíðaravmarkað. Søkjast kann um loyvi við at útfylla eitt oyðublað á heimasíðuni hjá Dátueftirlitinum, og senda tað inn umvegis heimasíðuna ella við postinum. Í høvuðsheitum krevst loyvi frá Dátueftirlitinum til eina viðgerð, tá viðkvæmar persónsupplýsingar verða viðgjørdar, tó eru undantøk til hesa reglu. Viðkvæmar persónsupplýsingar eru upplýsingar um: lit og ættarslag, um átrúnaðarliga, heimsspekiliga ella politiska sannføring, um revsiverd og kynslig viðurskifti, heilsustøðu, yrkisfelagsligt tilknýti, munandi sosialar trupulleikar og onnur heilt privat viðurskifti. Í kunngerð nr. 2 frá 25. februar 2004 um undantøk frá reglunum um viðgerðarloyvi eru ásett ymisk undantøk til reglurnar um viðgerðarloyvi.

***Fráboðan:***
Tá viðgerðarloyvi ikki krevst til eina viðgerð, skal henda tó sum høvuðsregla fráboðast Dátueftirlitinum.

Hetta merkir, at Dátueftirlitið skal hava eina frágreiðing um, at viðkomandi ætlar at viðgera ávísar persónsupplýsingar. Ein fráboðan kann gerast við at útfylla eitt oyðublað (fráboðanarskjal) á heimasíðuni hjá Dátueftirlitinum, og senda tað inn umvegis heimasíðuna ella við postinum. Fráboðanin skal latast Dátueftirlitinum í seinasta lagi 30 dagar áðrenn viðgerðin er ætlað at byrja. Tríggjar kunngerðir eru gjørdar við undantøkum til fráboðanarskylduna. Hetta merkir í høvuðsheitum, at um persónsupplýsingar, sum eru ikki viðkvæmar, verða viðgjørdar, skal henda viðgerð ikki fráboðast Dátueftirlitinum. Flestu fráboðanirnar, sum Dátueftirlitið hevur fingið hetta árið, hava snúð seg um vakmyndatól ella um at flyta persónsupplýsingar av landinum.



### 3.11.1. Loyvi til verkætlanir

Dátueftirlitið hevur í 2009 givið loyvi til ymiskar verkætlanir. Av hesum verkætlanum kunnu m.a. nevnast hesar:

### 3.11.2. Verkætlan: Verkætlan at kanna sambandið millum sáðgóðsku og t.d. PCB-nøgdir í blóðinum hjá einum bólki av 22 ára gomlum føroyskum monnum

**Dátuábyrgdari:** Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu (Pál Weihe)

**Endamál:** Skráseta upplýsingar um persónar, sum eru við í eini granskingarverkætlan hjá Jónrit Halling.

**Háttur:** Talan er um eina kohortu av 22 ára gomlum monnum, sum síðani teir vóru føddur í 1986/87 hava luttikið í sonevndu kviksilvurkanningini á DFAA. Tað eru ungu menninir í hesi kohortu, sum DFAA nú setir seg í samband við fyri at kanna teirra sáðgóðsku. Menninir verða somuleiðis spurdir um loyvi til, at DFAA setir seg í samband við pápar teirra og bjóðar teimum at verða við í somu kanning. Upplýsingarnar skulu fáast til vega við samtykki frá skrásetta og skulu nýtast í omanfyri nevndu verkætlan.

**Góðkenning:** Vísindasiðsemisnevndin hevur góðkent verkætlanina 6. mai 2009.

**Viðgerðarloyvi:** Viðgerðarloyvi varð givið tann 9. desember 2009 við ávísum treytum.

Loyvið er galdandi til 1. juli 2011, tá tað skal endurskoðast.

### 3.11.3. Verkætlan: Kanning av livikorunum hjá fólkapensjónistum

**Dátuábyrgdari:** Elin Súsanna Jacobsen og Beinta í Jákupsstovu

**Endamál:** Endamálið við kanningini er við spurnabløðum at fáa kannað, hvussu livikorini eru hjá fólkapensjónistum í Føroyum.

**Háttur:** Kanningin verður gjørd út frá spurningum, ið verða settir eini 500 fólkum, 67 ár og eldri, tilvildarliga útvald av Landsfólkayvirlitinum út frá føðingardegi.

Spurningarnir viðvíkja fíggjarstøðu (inntøkur, útreiðslur og ognarviðurskifti) og fysiskum karmum so sum bústaðarviðurskiftum. Spurt verður eisini um frítíðarvanar, sosialt netverk og heilsustøðu generelt, t.e. tey verða spurd um tey meta seg hava góða ella vánaliga heilsu. Kanningin verður gjørd við spurnabløðum, sum verða send út, soleiðis at tey spurdu kunnu fyrireika seg til at verða ringd upp av einum interviewara. Svørini verða síðan plottað inn á serstakt programm so hvørt, og síðan verður úrslitið av kanningini analyserað og hagtølsviðgjørt.

**Viðgerðarloyvi:** Viðgerðarloyvi varð givið tann 2. desember 2009 við ávísum treytum.
Loyvið er galdandi til 1. apríl 2010.

Virksemi í árinum 2009

### 3.11.4. Verkætlan:
### Starvsfólk á dagstovnum í Føroyum – ein trivnaðarkanning. Kanningin er ein umbiðin uppgáva frá Føroya Pedagogfelag

**Dátuábyrgdari:** Karin Jóhanna L. Knudsen

**Endamál:** Endamálið við kanningini er at lýsa trivnaðin hjá starvsfólkum á dagstovnum í Føroyum.

**Háttur:** Kanningin verður gjørd við spurnabløðum til starvsfólk á dagstovnum. Kanningin er ætlað at vera liðug í mars 2010.

**Viðgerðarloyvi:** Viðgerðarloyvi varð givið 13. november 2009 við ávísum treytum.

### 3.11.5. Verkætlan:
### Altjóða kanning av glykogen goymslubreki Typu III

**Dátuábyrgdari:** Ulrike Steuerwald

**Endamál:** Endamálið við verkætlanini er, við at kanna eitt stórt tal av sjúklingum, at finna risikofaktorar fyri, hví trupulleikar sum t.d. cardiomyopathy koma fyri hjá nøkrum sjúklingum, við GSDIII at finna risikofaktorar viðvíkjandi hesum trupulleika, og soleiðis at kunna geva tilmæli um besta viðgerðarháttin.

**Háttur:** Upplýsingarnar skulu skulu fáast til vega við samtykki frá skrásettu og nýtast í verkætlanini, har tær skulu knýtast at upplýsingum um m.a heilsustøðu og onnur heilt privat viðurskifti.

**Viðgerðarloyvi:** Vísindasiðsemisnevndin hevur tann 22. august 2009 góðkent verkætlanina. Í skrivinum frá Vísindasiðsemisnevndini verður sagt, at Torkil á Steig, yvirlækni og MD og MPH Ulrike Steuerwald hava loyvi til at arbeiða við verkætlanini frá 2009 til 2010.

Viðgerðarloyvið er galdandi til 31. desember 2010, tá tað kann endurskoðast.

### 3.11.6. Verkætlan:
### Serritgerð um inklusión (at vera við í bólkinum) – kanningin verður gjørd í samband við serritgerð á Danmarks Pædagogiske Universitet.

**Dátuábyrgdari:** Sigrid Vesturgarð

**Endamál:** Endamálið við kanningini er, við videoupptøkum av børnum í frítíðarskúlum, at kanna hvat hendir í relatiónum millum børn og millum børn og vaksin.

**Háttur:** Kanningin verður gjørd við videoupptøkum av børnum og við spurnabløðum til børn, starvsfólk og møgulig foreldur. Kanningin er ætlað at vera liðug í juni 2009 .

**Viðgerðarloyvi:** Viðgerðarloyvi varð givið 18. mars 2009 við ávísum treytum.

### 3.11.7. Verkætlan:
### Antimicrobial resistance in Streptococcus pneumoniae, Streptococcus pyogenese and Escherichial coli from the Faroese population, correlation with antimicrobial use and comparison with Denmark and Iceland.

**Dátuábyrgdari:** Bárður Enni

**Endamál:** Endamálið við viðgerðini er at skráseta upplýsingar um persónar, sum eru við í eini granskingarverkætlan hjá Maritu Debes Magnussen.

**Háttur:** Royndir skulu takast frá tilvildarliga útvaldum børnum á dagstovnum. Kanningarnar kundu síðan staðfesta, um børnini vóru berarar av Streptococcus pneumoniae.

Børnini verða skrásett við navni, føðingardegi og kontaktupplýsingum. Tá ið royndirnar eru innsavnaðar, verða kontaktupplýsingarnar ikki nýttar, men bert aldur og kyn.

**Viðgerðarloyvi:** Vísindasiðsemisnevndin hevur tann 7. november 2008 góðkent verkætlanina og

hevur í loyvinum givið Maritu D.Magnussen, mikrobiologi og Karl G. Kristinsson, yvirlækna loyvi til at arbeiða við verkætlanini í 2008 til 2011.

Viðgerðarloyvið frá Dátueftirlitinum varð givið 8. januar 2009 við ávísum treytum, galdandi til 1. oktober 2011, tá tað kann endurskoðast.

### 3.11.8. Aðrar verkætlanir, sum ikki hava kravt loyvi frá Dátueftirlitinum

Dátueftirlitið hevur í 2009 viðgjørt aðrar verkætlanir, har niðurstøðan hjá Dátueftirlitinum hevur verið, at loyvi frá Dátueftirlitinum ikki krevst til viðkomandi verkætlanir. Nevnast kann m.a. skipan, sum stendur á flogvøllinum í Vágum, har ferðafólk, sum fara við flogfari úr Vágum, skulu upplýsa í hvørjum landi tey búgva. Ongar aðrar upplýsingar verða skrásettar og Dátueftirlitið kom tískil fram til, at upplýsingarnar eru so mikið navnloyndar, at tað ikki krevst loyvi frá Dátueftirlitinum til skipanina.

### 3.11.9. Ílegusavnið (Fráboðaðar granskingarverkætlanir)

Ílegusavnið varð sett á stovn við løgtingslóg nr. 62 frá 17. mai 2005 um gransking í mannaílegum (Ílegulógin) og í §§ 3-5 og 7 hevur Ílegusavnið lógarheimild at viðgera viðkvæmar persónsupplýsingar. Dátureftirlitið metir, at heimildin hjá Ílegusavninum í §§ 3-5 og 7 í Ílegulógini til at viðgera viðkvæmar persónsupplýsingar eisini fevnir um at viðgera viðkvæmar persónsupplýsingar í ítøkiligu verkætlanunum.

Av tí at Ílegusavnið sostatt hevur lógarheimild at viðgera viðkvæmar persónsupplýsingar, krevst onki viðgerðarloyvi frá Dátueftirlitinum. Hetta fylgir av reglunum í § 1, nr. 3 í kunngerð nr. 2 frá 25. februar 2004 um undantøk frá reglunum um viðgerðarloyvi og hevur hetta við sær, at loyvi ikki krevst frá Dátueftirlitinum til ítøkiligu verkætlanirnar hjá Ílegusavninum, men at hesar tó skulu fráboðast Dátueftirlitinum sambært § 32 í persónsupplýsingarlógini. Dátueftirlitið hevur upp á ítøkiligan fyrispurning svarað Ílegusavninum, at mett verður ikki, at tað ber til at gera eina fráboðan, sum fevnir um bæði generellu skipanina og verkætlanir sum heild, orsakað av at viðgerðirnar eru ymiskar í mun til § 34 í persónsupplýsingarlógini. Verkætlanirnar skulu sostatt fráboðast Dátueftirlitnum í hvørjum einstøkum føri.

***Í 2009 hevur Ílegusavnið fráboðað hesar verkætlanir:***

- Forkanningarverkætlan - Pendred Syndrome
- Granskingarverkætlan viðvíkjandi manglandi viðføddum luktisansi (anosmi)
- Verkætlan - savning av blóð-, spýtt- og vevnaðarroyndum til framtíðar granskingarendamál
- Verkætlan -”Incidens af thyrioideasygdomme på Færøene”
- Verkætlan “En epidemiologisk undersøgelse af c.mammae på Færøerne”
- Verkætlan viðvíkjandi idiopatisk generaliserað epilepsi
- Verkætlan viðvíkjandi nanoftalmus
- Verkætlan viðvíkjandi CTD

## 3.12. HOYRINGAR

### 3.12.1. Lógaruppskot

Dátueftirlitið hevur í árinum fingið hesi lógaruppskot til hoyringar:

- Broyting av løgtingslóg um kringvarp
- Løgtingslóg – Heilsutrygdin
- Broyting av løgtingslóg um postvirksemi
- Broyting av løgtingslóg um fólkaskúlan
- Uppskot til løgtingslóg um elektroniska undirskrift
- Løgtingslóg um val til kirkjuráð, próstadømisráð og stiftsstjórn
- Uppskot til fyriskipan um at seta í gildi í Føroyum lóg um fíggjarligt virksemi
- Lóg um virðisbrævahandil
- ”Lov om investeringsforeninger og specialforeninger samt andre kollektive investeringsordninger m.v”

### 3.12.2. Kunngerðir

Dátueftirlitið hevur í árinum fingið hesar kunngerðir til ummælis:

- Kunngerð um broyting í kunngerð um forskriftir og forskriftaskyldu v.m.
- Hoyring av 4 kunngerðum um fíggjarligar fyritøkur, investeringsfeløg o.t.
- Kunngerð um "Forebyggende foranstaltninger mod hvidvask af udbytte og finansiering af terrorisme"
- "Bekendtgørelse om hvilke fysiske og juridiske personer samt produkter, der kan undtages fra lov om forebyggende foranstaltninger mod hvid vask af udbytte og finansiering af terrorisme, samt definitionen af politisk udsatte personer."

### 3.12.3. KT-politikkur

Fleiri almennir myndugleikar hava í árinum vent sær til Dátueftirlitið við fyrispurningum um ymiskt í samband við kt-trygd og kt-politikk yvirhøvur. Dátueftirlitið hevur í 2008 ummælt kt-politikk hjá hesum almennu myndugleikum:

- Kunningartrygdarpolitikkur hjá landsumsitingini

Somuleiðis hevur Dátueftirlitið ummælt "uppskot til mannagongdir viðvíkjandi journalskipan og leiðbeining til journalisering fyri kommunurnar", sum Føroya Kommunufelag sendi Dátueftirlitinum til hoyringar.



Uppgávurnar hjá Dátueftirlitinum eru nógvar og málsviðgerðin er fjøltáttað.

# 4 Ávís útvald mál í 2009



## 4.1. YMISK MÁL

Í hesum partinum av ársfrágreiðingini verður greitt nærri frá einstøkum útvaldum málum í 2009.

### 4.1.1. Hagtøl fyri arbeiðsloysi í Føroyum

Dátueftirlitið fekk í januar 2009 tvær fráboðanir frá Hagstovu Føroya viðv. viðgerð av viðkvæmum upplýsingum. Tann 12. mars 2009 fekk Dátueftirlitið eisini Dátutrygdarreglugerð fyri Hagstovu Føroya.

Upplýst var, at endamálið við viðgerðini er at savna og goyma upplýsingar um arbeiðsloysi fyri at gera hagtøl um arbeiðsloysi í Føroyum. Talan er um upplýsingar um arbeiðsleys, ið fáa útgjald frá Almannastovuni og arbeiðsleys undir Arbeiðsloysistryggingini. Upplýsingarnar verða útvegaðar ávikavist frá Almannastovuni og Arbeiðsloysistryggingini.

Sbrt. §§ 3 og 4 í Løgtingslóg nr. 33 frá 7. mai 1991 um Hagstovu Føroya, hevur Hagstovan lógarheimild til at krevja allar neyðugar upplýsingar um tey samfelagsviðurskifti, sum hon skal lýsa sbrt. § 1 stk. 2.

Av tí at Hagstovan hevur lógarheimild at viðgera allar neyðugar upplýsingar, krevst onki viðgerðarloyvi frá Dátueftirlitinum, hetta fylgir av reglunum í § 1, nr. 3 í kunngerð nr. 2 frá 25. februar 2004 um undantøk frá reglunum um viðgerðarloyvi.

Hóast onki viðgerðarloyvi krevst skal viðgerðin av viðkvæmum persónsupplýsingum hjá Hagstovuni fráboðast Dátueftirlitinum sambært § 32 í persónsupplýsingarlógini.

Dátueftirlitið boðaði Hagstovuni frá, at fráboðanirnar vóru nøktandi og fullfíggjaðar.

### 4.1.2. Internetrættindi hjá starvsfólki (Facebook)

Dátueftirlitið fekk í januar 2009 ein fyrispurning frá einum starvsfólki, har spurt var um ein arbeiðsgevari uttan at boða frá, kann stongja fyri atgongdini hjá starvsfólkunum til Facebook.

Niðanfyri er brot úr svarinum frá Dátueftirlitinum:

*"Tá ið starvsfólk eru til arbeiðis, nýta tey m.a. telduútbúnað og telduskipanir hjá arbeiðsgevara. Í samband við at arbeiðsgevarin skal leiða og fordeila arbeiðið, hevur hann myndugleika til at avgera, hvussu telduútbúnaðurin og telduskipanirnar skulu nýtast. Um ikki annað er ásett, so verður í dag gingið út frá, at starvsfólk í ávísan mun hava rætt til at nýta arbeiðstelduna privat. Men arbeiðsgevarin hevur rætt til at avgera, at starvsfólk ikki skulu hava atgongd til ávísar heimasíður ella ikki skulu brúka arbeiðstelduna privat.*

*Tú spyrt um arbeiðsgevarin ikki fyrst skal koma við eini ávaring, áðrenn hann stongir Facebook-síðuna. Tú hevur rætt í, at tað hevði verið ein betri mannagongd, um starvsfólkini vóru kunnaði áðrenn, men hetta er ikki eitt krav sambært reglunum í persónsupplýsingarlógini, sum Dátueftirlitið varðar av".*

### 4.1.3. Handfaring av upplýsingum, tá persónurin er deyður

Dátueftirlitið fekk tann 11.mars 2009 ein fyrispurning frá Almannastovuni har spurt var um, hvussu farast skal fram í samband við upprudding á skrivstovu eftir persóni, sum er deyður.

Dátueftirlitið svaraði tann 19. mars 2009 fyrispurninginum frá Almannastovuni og niðanfyri er brot úr svarinum:

*"Fyrst skal Dátueftirlitið vísa á, at upplýsingar um ymisk viðurskifti millum arbeiðsgevarar og arbeiðstakarar eru at finna á heimasíðuni hjá Dátueftirlitinum [www.datueftirlitid.fo](http://www.datueftirlitid.fo) undir punktinum "Arbeiðsmarknaður." Dátueftirlitið arbeiðir støðugt við at víðka hesar upplýsingarnar á heimasíðuni, tí tað sær út til at tørvur er á hesum.*

*Viðvíkjandi innliti í teldupostar og fílur hjá starvsfólki, sum eru deyð so eru ikki beinleiðis reglur á hesum øki, og mett verður tískil at spurningurin má avgerast ítøkiligt í hvørjum einstøkum føri og viðmerkingarnar frá Dátueftirlitinum eru sostatt bara vegleiðandi.*

*Dátueftirlitið metir, at arbeiðsgevarin møguliga kann leita seg fram til post, sum hoyrir til arbeiðið og mælt verður til, at álitisumboðið ella annað umboð fyri starvsfólkið er til staðar í slíkum føri. Avvarðandi og arvingar hjá starvsfólkinum hava ikki beinleiðis atgongd til privatar teldupostar og fílur hjá tí deyða. Fíggjarlig viðurskifti og skyldur verða yvirtikin av einum deyðsbúgvi, men teldupostsamskifti verður neyvan roknað upp í tílíkar skyldur, og eigur arbeiðsgevarin tí at halda aftur við at geva búnum innlit. Løgreglan hevur tó altíð rætt til í kanningarhøpi at fáa innlit í dátukervið.*

*Dátueftirlitið kann í hesum sambandi somuleiðis upplýsa, at arbeiðsgevarin hevur ikki sakliga grund til at varðveita teldupostkassa í navninum hjá fólki, sum ikki longur eru í arbeiði. Teldupostkassin eigur tí at verða strikaður, so skjótt sum viðkomandi ikki er í starvinum longur. Tó verður arbeiðsgevarin sjálvsagt noyddur at tryggja sær, at hann fær teir teldupostar, sum hava við arbeiðið at gera, og sum eru sendir ella verða sendir til viðkomandi.*

*Arbeiðsgevarin kann ikki bara lata víðari til nýggj starvsfólk, teldupostar til starvsfólk, sum eru farin úr starvi, tí talan kann vera um, at privatir teldupostar eru uppií."*



### 4.1.4. Vakmyndatól á bústovni

Dátueftirlitið hevur tann 26. juni 2009 tikið avgerð í einum máli, har ein bústovnur ynskti at sleppa at nýta vakmyndatól um náttina at ansa eftir búfólki, sum bóru ymisk brek.

Ætlanin var, at seta vakmyndatól upp í íbúðunum hjá búfólkunum, beint við kamarið har búfólkini svóvu fyri á tann hátt at hava eftirlit við teimum um náttina, so tey ikki vóru til skaða fyri seg sjálvi ella onnur.

Upplýst varð, at Nærverkið ynskti prinsipiella støðutakan í málinum og málið varð lagt fyri á fundi í Dáturáðnum.

Dáturáðið kom til ta niðurstøðu at tað ikki var heimilað í § 8 jf. § 9, stk. 1 nr 6 í persónsupplýsingarlógini, at bústovnurin setti upp umrøddu vakmyndatól at ansa eftir búfólkunum um náttina, uttan so at læknalig meting fyrilá, sum greitt vísti á at tað, út frá einari læknaligari meting, er neyðugt at nýta nevndu vakmyndatól sum liður í observatión av sjúklingum um náttina.

Í samband við viðgerð av málinum vendi Dátueftirlitið sær til MBF fyri at fáa støðu felagsins til generella spurningin um at nýta vakmyndatól sum ein part av umsorganararbeiðnum á bústovnum fyri fólk við ymsum breki. Niðurstøðan hjá MBF var, at tey ivaðust í um vakmyndatól yvirhøvur eiga at verða nýtt sum loysn, tá talan er um ansing og/ ella umsorgarnaruppgávur á bústovnum og MBF metti at hetta er eitt tekin um at roynt verður at loysa ansingar- og umsorganaruppgávur við vakmyndatóli ístaðin fyri at umskipa vaktarskipanirnar á bústovnunum.

### 4.1.5. Sporing av stolnum telefonum

Dátueftirlitið fekk í juni 2009 ein fyrispurning frá Vodafone viðv. sporing av stolnum fartelefonum. Svarið hjá Dátueftirlitinum tann 26. juni 2009 var soljóðandi:

*"Vodafone hevur í teldubrævi tann 17. juni 2009 sett Dátueftirlitinum fyrispurning í samband við at ein kundi fær sína telefon stolna, og spyr hvørjar møguleikar Vodafone hevur í hesum sambandi at lata upplýsingar um sporing av telefonini víðari.*

*Vodafone hevur upplýst, at tá ein telefon verður stolin, so er telefonin útgjørd við einari IMEI kodu, sum*

*ger at bæði Vodafone og Føroya Tele kunnu spora hesa telefon í netinum og finna útav, um nakar brúkar hesa stolnu telefon.*

*Vodafone spyr í hesum sambandi um teir sum veitari kunnu:*

1. *Bjóða kundum at spora stolna telefon, treytað av, at stuldurin er meldaður til politiið og at upplýsningarnar um hvør brúkar telefon, verða latnir politiinum*
2. *Siga nei til hesa uppgávu*

*Dátueftirlitið hevur viðgjørt spurningin og metir ikki, at reglurnar í persónsupplýsingarlógini forða fyri,at Vodanfone kann bjóða fram eina tilíka tænastu. Hetta er tó treytað av, at kundin kann prógva at stuldurin er meldaður til løgregluna, og at upplýsingarnar um hvør brúkar stolnu telefonina bert verða latnar løgregluni."*

### 4.1.6. Betri Pensjón – útflýggjan av p-tølum hjá limunum í lærarafelagnum

Málið snýr seg í stuttum um, at Betri Pensjón hevur gjørt avtalu við Føroya Lærarafelag um, at allir limirnir í felagnum verða tryggjaðir hjá Betri Pensjón frá 1. januar 2010.

Fyri at kunna stovna tryggingarnar er neyðugt, at Betri Pensjón hevur persónstølini hjá limunum í Føroya Lærarafelag, og hevur Betri Pensjón tí heitt á Dátueftirlitið um at loyva Føroya Gjaldstovu at útflýggja Betri Pensjón ein lista við persónstølunum hjá lærarunum.

Dáturáðið kom til ta niðurstøðu at tað ikki er heimild í persónsupplýsingarlógini at útvega persónstøl frá Gjaldstovuni til Betri Pensjón uttan samtykki frá teimum skrásettu.






Niðurstøðan hjá Dátueftirlitinum var sojóðandi: *"Tað er álagt í skattalógini, § 120 p, at tryggingarfeløg skulu lata persónstølini til TAKS. Men tað er ongin áseting í § 120 p um hvørjum persónstølini skulu útvegast frá.*

*Dáturáðið metir ikki at heimild er í § 11 í persónsupplýsingarlógini til, at Betri Pensjón kann útvega persónstølini frá Gjaldstovuni, uttan samtykki frá teimum skrásettu. Fyri at Gjaldstovan skal lata víðari persónstølini, krevst, at skrásetti nágreiniliga hevur givið sítt samtykki til víðarigevingina, sbrt. § 11 stk. 3, nr. 2."*

### 4.1.7. GPS (Global Positioning System)

Dátueftirlitið fekk í 2009 fleiri fyrispurningar um GPS. Talan var bæði um GPS á minnisveikum og GPS á arbeiðsbilum. Dátueftirlitið valdi tískil at varpa ljós á hetta málið við at skriva eina grein og við at luttaka í kjaki í Útvarpi Føroya saman við forkvinnuni fyri Alzheimers felagið. Harafturat var GPS eisini eitt av evnunum, sum varð umrøtt á norðurlendska fundinum, sum varð hildin í Føroyum í juni mánaða.

Í greinini varð spurnartekin sett við, um GPS á minnisveik var umsorgan ella eftirlit. Hóast fólk eru minnisveik, kunnu tey vera væl fyri fysiskt og tískil kann tað tykjast sera skerjandi fyri teirra persónliga frælsi, um tey ikki fáa møguleika fyri at fara út, ganga túrar, fara til handils o.s.fr.

Í Føroyum eru enn ongar ser-

reglur um nýtslu av GPS´arum. Tá talan er um elektroniska viðgerð av persónsupplýsingum, sum tað er í hesum føri, og ongar serreglur eru, so fellur hetta økið undir persónsupplýsingarlógina.

Persónsupplýsingarlógin er mest at skilja sum ein rammulóg og kann tískil brúkast til alla viðgerð av persónsupplýsingum. Av somu orsøk, er ikki lagt upp fyri serligum viðurskiftum á ymiskum serøkjum, sum t.d. tá talan er um nýtslu av GPS á minnisveikum.

Sambært persónsupplýsingarlógini skal gerast ein meting av, hvørt áhugamálini hjá avvarðandi ella bústovnum fyri at nýta GPS viga tyngri enn fyrilitini fyri tí minnisveika. Avgerðin kann eftirmetast av Dátueftirlitinum í síðsta enda.

Hetta er ein torfør uppgáva at meta um, tí at tað eru so nógvir ósvaraðir spurningar, sum stinga seg upp - spurningar sum fakfólk eiga at taka støðu til, t.d:

- Í hvørjum føri skal GPS nýtast?
- Hvussu minnisveik skulu fólkini vera?
- Skulu felags mannagongdir gerast fyri alt landið?
- Hvør skal taka avgerðina, um persónurin sjálvur ikki er førur fyri at gera tað?
- Kunnu avvarðandi samtykkja?
- Skal ein læknalig meting gerast í hvørjum einstøkum føri?
- Hvør kann fáa atgongd til upplýsingarnar frá GPS´aranum?

**Serligar reglur**

Í Danmark er tað serliga tann sokallaða "Serviceloven", sum regulerar hetta økið. Um so er, at tann minnisveiki ikki sjálvur er førur fyri at geva eitt samtykki, kunnu sosialir myndugleikar í ávísum føri geva loyvi til, at GPS kann nýtast í eitt avmarkað tíðarskeið. Í Servicelógini eru tó sera strong krøv til, nær sosialir myndugleikar kunnu geva loyvi, t.d. skal tað prógvast, at tað er ein vandi fyri, at persónurin setir seg sjálvan ella onnur í vanda, um viðkomandi fer frá húsum. Harafturat er tað eitt krav, at tað skal vera alneyðugt at nýta GPS´ara. Støðugt at kunna yvirváka, hvar ein persónur er, verður mett at vera sera skerjandi fyri persónliga frælsið, so tískil skal nýtsla av GPS vera síðsti útvegur.

Í Føroyum vanta reglur á hesum øki, og er hetta eitt mál, landsins politikarar áttu at tikið upp.

## 4.2. MÁL TIKIN UPP AV EGNUM ÁVUM

Sambært § 37, stk. 1, nr. 1 í persónsupplýsingarlógini hevur Dátueftirlitið heimild at taka mál upp av egnum ávum, og í 2009 tók Dátueftirlitið tvey mál upp av egnum ávum.

### 4.2.1. Myndir á heimasíðum

Dátueftirlitið gjørdi í apríl 2009 av at senda øllum fólkaskúlum í landinum eitt bræv, har reglurnar fyri, nær tað er loyvt at leggja myndir á internetið, vóru lýstar.

Orsøkin til at Dátueftirlitið tók hetta mál upp er, at tað er vorðið alsamt meira vanligt, at fólkaskúlar leggja myndir av næmingum á heimasíðu skúlans. Dátueftirlitið hevur fingið fleiri fyrispurningar frá skúlum og foreldrum, sum hava spurt seg fyri, um tað er loyvt at leggja myndir av skúlabørnum út á netið.

At almannakunngera myndir av persónum, sum kunnu kennast aftur, á internetinum verður roknað



sum talgild viðgerð av persónsupplýsingum. Hetta er galdandi uttan mun til, um tekstur er við myndini, sum sigur frá, hvør viðkomandi er. Reglurnar í persónsupplýsingarlógini eiga tí at verða loknar.

Ongar nágreiniligar reglur eru í persónsupplýsingarlógini um at almannakunngera myndir á internetinum uttan samtykki. Dátueftirlitið hevur tó í fleiri konkretum málum mett, hvørt viðgerðin hevur verið lóglig, sæð út frá persónsupplýsingarlógini. Í metingini verður dentur lagdur á, hvørt áhugamálini hjá skúlanum fyri at leggja myndir á heimasíðuna viga tyngri enn fyrilitini fyri at verja privatlívið hjá tí einstaka skúlanæminginum. Soleiðis verður tað altíð ein konkret meting, hvørt almannakungerð er lóglig ella ikki. Í fyrsta umfari er tað skúlans leiðsla, sum skal gera hesa meting.

Niðanfyri verður greitt frá, hvussu praksis er hjá Dátueftirlitinum at almannakunngera myndir á internetinum:

**Støðumyndir:**
Støðumyndir eru at meta sum myndir, har ein aktivitetur ella ein støða er endamálið við myndini.

Útgangsstøðið er, at støðumyndir kunnu almannakunngerast uttan samtykki við heimild í áhuga-/fyrilitsreglunum í persónsupplýsingarlógini, sum greitt frá omanfyri.

Av tí at talan er um eina heildarmeting av endamálinum við at almannakunngera eina mynd, eigur at verða tikið atlit til í hvørjum sambandi myndin er tikin, og endamálinum við at almannakunngera myndina. Avgerandi er, at tann persónur, sum er á myndini, ikki eigur at kunna kenna seg sýndan fram, brúktan ella eyðmýktan. Myndirnar skulu sostatt vera meinaleysar.

Dømi um støðumyndir, sum vanliga kunnu almannakunngerast uttan samtykki:
- Myndir tiknar av jólahaldi ella útferð hjá skúlanum
- Myndir tiknar av børnum sum spæla í einum skúlagarði

Tó kunnu myndir vera soleiðis, at tær kunnu kennast særandi fyri tey, sum eru avmyndað. T.d. um tveir persónar kunnu kennast aftur í eini óhepnari støðu. Í slíkum førum krevst samtykki.

**Andlitsmyndir:**
Endamálið við andlitsmyndum er at avmynda ein ella fleiri ávísar persónar. Her eru tað persónarnir sjálvir, sum eru í fokus.

Til at almannakunngera andlitsmyndir á netinum krevst altíð samtykki. Útgangsstøðið er, at um persónurin á myndini er 15 ár ella eldri, kann hann sjálvur geva samtykki. Annars krevst samtykki frá foreldrum.

Orsøkin til, at andlitsmyndir krevja samtykki, er at mett verður her, at fyrilitini fyri at verja privatlívið hjá tí einstaka skúlanæminginum viga tyngri enn áhugamálini hjá skúlanum at leggja myndir á heimasíðuna.

Dømi um andlitsmyndir, sum vanliga ikki kunnu almannakunngerast uttan samtykki:

- Myndir av næmingum, har tað er næmingurin, sum er í fokus
- Floksmyndir
- Myndir av lærarum, har tað er lærarin, sum er í fokus

Um skúli vil almannakunngera andlitsmyndir, t.d. floksmyndir av næmingum á sínari heimasíðu, má hetta tískil bara gerast, um hvør einstakur næmingur frammanundan hevur givið sítt samtykki, ella viðkomandi foreldur, alt eftir hvussu gamal næmingurin er.

Samtykki kann fáast til vega á ymiskan hátt. Eitt hugskot er, at foreldur í samband við innskriving av næmingum, verða spurd um tey samtykkja til, at myndir av teirra børnum kunnu leggjast á heimasíðu skúlans. Í hesum sambandi skulu foreldur verða nágreiniliga kunnað um, hvat samtykkið fevnir um.

### 4.2.2. Sjónbandaupptøkur í frítíðarskúla

Eitt annað mál, sum Dátueftirlitið tók upp av egnum ávum í 2009 var eitt mál um kanningar á einum frítíðarskúla í Tórshavn. Umvegis foreldur varð Dátueftirlitið gjørt varugt við, at kunningarskriv vóru send foreldrum at børnum í einum frítíðarskúla um at nakrar kanningar skuldu gerast av børnunum, herundir samrøða, eygleiðing og sjónbandaupptøkur. Kanningarnar skuldu gerast sum liður í serritgerð um inklusión (at vera við í bólkinum) hjá einum lesandi á Danmarks Pædagogiska Universiteti.

Dátueftirlitið setti seg í samband við tann lesandi og gjørdi í skrivi vart við, at reglurnar á økinum eru hesar.

*"Spurningar, eygleiðing og sjónbandaupptøkur av persónum eru persónsupplýsingar og er tískil fevnt av Løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum, sum broytt við Løgtingslóg nr. 24 frá 17. mai 2004. (Persónsupplýsingarlógin)*

*Persónsupplýsingarlógin ásetur einki ítøkiligt um sjónbandaupptøkur, men lógin ásetur fleiri meginreglur við viðgerð av persónsupplýsingum. Hesar eru at finna í §§ 8-10 í persónsupplýsingarlógini og merkja í høvuðsheitum at tey, sum vera filmaði skulu vera kunnaði og hava samtykt til at sjónbandaupptøkurnar fara fram. Um talan er um børn undir 15 ár, krevst samtykki frá foreldrunum. Viðv. burturbeiningini av sjónbandaupptøkunum, so er galdandi, at upptøkurnar ikki skulu verða goymdar longur enn neyðugt.*

*Í brævinum tú sendi heim við børnunum sær út til, at hesar treytir verða fylgdar, men tó er tað soleiðis, at um viðkvæmar persónsupplýsingar verða viðgjørdar í slíkari kanning, krevst loyvi frá Dátueftirlitinum til kanningina. Út frá upplýsingunum í brævi tínum, meti eg tað ikki kunna útilokas,t at viðkvæmar persónsupplýsingar kunnu verða viðgjørdar, og eg vil tí mæla tær til at seta teg í samband við Dátueftirlitið við fleiri upplýsingum um kanningina."*

Dátueftirlitið gav tann 18. mars 2009 loyvi til omanfyrinevndu kanningar við ávísum treytum. Tann 5. oktober 2009 var serritgerðin liðug, og Dátueftirlitið fekk boð um at allar upplýsingarnar vóru strikaðar.

Tað sum eyðkennir londini rundanum okkum, tá talan er um vernd av persónsupplýsingum, er eitt víttfevnandi altjóða samstarv.

# 5 Altjóða samstarv

Altjóða samstarv

Tað sum eyðkennir londini rundanum okkum, tá talan er um vernd av persónsupplýsingum, er eitt víttfevnandi altjóða samstarv. Hetta samstarv hevur stóran týdning og er neyðugt, orsakað av at persónsupplýsingar ofta verða fluttar um landamørk.

Flestu grannalondini hava eins og Føroyar eina persónsupplýsingarlóg, ið er grundað á ES-fyriskipan 95/46EF frá 24.10.1995 um verju av likamligum persónum við viðgerð av persónsupplýsingum og frítt skifti av persónsupplýsingum millum lond. Meginreglan í hesi fyriskipan er, at viðgerð skal vera í samsvari við grundleggjandi persónsverndaratlit sum persónsfrælsi og heimafrið hins einstaka. Eisini skal viðgerð av persónsupplýsingum virka til frama fyri øktari vælveru hjá tí einstaka og øktum samhandli landanna millum.

Tá tað snýr seg um at flyta persónsupplýsingar millum lond, býtir ES-lóggávan londini upp í limalond og triðjalond. Persónsupplýsingar kunnu frítt flytast millum limalondini í Evropasamveldinum, tí hesi hava somu trygdarstig. Snýr tað seg hinvegin um triðjalond, so hevur ES-nevndin býtt hesi lond upp í trygg og ótrygg triðjalond. Trygg triðjalond eru lond, sum kunnu tryggja eins góða trygd fyri persónsupplýsingum, sum ES-londini gera, og á heimasíðuni hjá ES-nevndini er ein listi yvir triðjalond, sum eru góðkend sum trygg triðjalond.

Innlendismálaráðið setti í 2005 eina kunngerð í gildi, har flutningur av persónsupplýsingum til øll ES-lond og tey londini, sum ES-nevndin hevur lýst sum trygg triðjalond, ikki krevur loyvi frá Dátueftirlitinum, men skal fráboðast Dátueftirlitinum. Somuleiðis søkti Innlendismálaráðið í 2005 ES-nevndina um at góðkenna Føroyar sum eitt trygt triðjaland í persónsupplýsingarhøpi. Arbeitt hevur verið við málinum í longri tíð, og arbeiðið er nú komið væl áleiðis, men bíðað verður framvegis eftir at fáa endaliga góðkenning frá ES-nevndini. Uttanríkisráðið hevur upplýst at roknast kann við endaligum svari frá ES í 2010.

## 5.1. NORÐURLOND

Virkið samstarv fer fram millum dátueftirlitini í Føroyum, Danmark, Íslandi, Noregi, Finnlandi og Svøríki. Hesi lond halda árliga samstarvsfundir bæði fyri málsviðgerum, leiðarum og teknikarum.

Dátueftirlitið hevur síðan 2005 luttikið á árligu málsviðgerafundunum millum norðurlendsku dátueftirlitini. Á hesum fundum eru framløgur um ymisk evni t.d. møguleikar við nýggjari tøkni, greitt verður frá týdningarmiklum málum í farna árinum, londini greiða frá ymiskum nýggjum trupulleikum, sum stinga seg upp og høvi er at fáa ymiskar spurningar á skrá til kjak.

Dátueftirlitið var vertur fyri árliga norðurlendska málsviðgerafundinum, sum í 2009 varð hildin í Tórshavn 2. til 4. juni, og luttóku umboð fyri dátueftirlitini í hinum norðanlondini á fundinum. Á fundinum vórðu ymisk áhugaverd evni viðgjørd, m.a.:

- Sosial netverk so sum Facebook
- Arbeiðsgevarin hevur eftirlit við starvsfólkinum
- Eftirlit við vakmyndatóli
- Eftirlit við GPS
- Talgild sjúklingajournal

Dátueftirlitið metir, at tað hevur stóran týdning at luttaka á hesum fundum, og at vit kunnu læra nógv av londunum rundanum okkum. Londini hava havt lóggávu á hesum økinum longri enn vit hava í Føroyum, og tey kenna tí oftast teir trupulleikar vit stríðast við, og kunnu vísa á ymiskar loysnir, sum tey hava nýtt.

Á fundinum varð avgjørt, at Ísland skal vera vertir fyri Norðurlendska fundinum í 2010.

# 6 Eftirlit í 2009

Dátueftirlitið var í 2009 á eftirliti hjá P/F Poul Michelsen Heilsølu, Ternubúðini, Idé Møblum, umborð á Smyrli og á Landssjúkrahúsinum. Niðanfyri er ein samandráttur av framdu eftirlitunum. Víst verður annars til frágreiðing frá eftirlitunum, sum liggur á heimasíðuni www.datueftirlitid.fo

## 6.1. EFTIRLIT VIÐV. VAKMYNDATÓLUM

## 6.2. EFTIRLIT HJÁ TERNUBÚÐINI

Tann 4. mai 2009 framdi Dátueftirlitið fráboðað eftirlit í hølunum hjá Ternubúðini í Tórshavn.

Á eftirlitinum varð staðfest, at 7 vakmyndatól vóru ymsastaðni í handilshølunum. Staðfestast kundi somuleiðis, at Ternubúðin sum dátuábyrgdari av vakmyndatólunum ikki hevði fráboðað Dátueftirlitinum vakmyndatólini, og eigarin fekk á staðnum boð um at fráboða Dátueftirlitinum vakmyndatólini sum skjótast sbrt. § 2, stk. 3 í kunngerð nr. 31 frá 11. apríl 2005 um fráboðanarskyldu til Dátueftirlitið, sum broytt við kunngerð nr. 71 frá 2. juli 2007.

Dátuábyrgdarin fekk við brævi, dagfest 13. mai 2009 boð um, at ymisk krøv skuldi vera lokin, og eftir at hetta varð gjørt, ger Dátueftirlitið ikki meira við málið.

## 6.3. EFTIRLIT HJÁ P/F POUL MICHELSEN

Tann 4. mai 2009 framdi Dátueftirlitið fráboðað eftirlit i hølunum hjá P/f Poul Michelsen í Tórshavn. Á eftirlitinum varð staðfest, at 10 vakmyndatól vóru ymsastaðni í hølunum. Staðfestast kundi somuleiðis, at P/f Poul Michelsen sum dátuábyrgdari av vakmyndatólunum ikki hevði fráboðað Dátueftirlitinum vakmyndatólini, og eigarin fekk á staðnum boð um at fráboða Dátueftirlitinum vakmyndatólini sum skjótast sbrt. § 2, stk. 3 í kunngerð nr. 31 frá 11. apríl 2005 um fráboðanarskyldu til Dátueftirlitið, sum broytt við kunngerð nr. 71 frá 2. juli 2007.

Dátuábyrgdarin fekk við brævi, dagfest 13. mai 2009 boð um, at ymisk krøv skuldu verða lokin, og eftir at hetta varð gjørt, ger Dátueftirlitið ikki meira við málið.

## 6.4. EFTIRLIT HJÁ STRANDFARASKIPUM LANDSINS - SMYRIL

Tann 4. mai 2009 framdi Dátueftirlitið fráboðað eftirlit umborð á strandfaraskipinum Smyrli, sum lá við bryggju í Tórshavn.

Á eftirlitsinum varð staðfest, at 17 vakmyndatól vóru ymsastaðni umborð á skipinum, og Dátueftirlitið fekk útflýggjað tekning, sum vísti, hvar tólini standa. Greitt varð frá, at endamálið við vakmyndatólunum er at fyribyrgja herverki og ófriði umborð og sum trygd fyri ferðafólki og manning. Myndatólini eru virkin alla tíðina.

Staðfestast kundi somuleiðis, at Strandfaraskip landsins sum dátuábyrgdari av vakmyndatólunum ikki hevði fráboðað Dátueftirlitinum vakmyndatólini, og eigarin fekk á staðnum boð um at fráboða Dátueftirlitinum vakmyndatólini sum skjótast sbrt. § 2, stk. 3 í kunngerð nr. 31 frá 11. apríl 2005 um fráboðanarskyldu til Dátueftirlitið, sum broytt við kunngerð nr. 71 frá 2. juli 2007.

Dátuábyrgdarin fekk við brævi, dagfest 13. mai 2009 boð um, at ymisk krøv skuldu verða lokin, og eftir at hetta varð gjørt, ger Dátueftirlitið ikki meira við málið.

## 6.5. EFTIRLIT HJÁ IDÉ MØBLUM

Tann 4. mai 2009 framdi Dátueftirlitið fráboðað eftirlit i hølunum hjá Idé Møblum í Tórshavn. Á eftirlitinum varð staðfest, at 19 vakmyndatól vóru ymsastaðni í hølunum, harav 3 vóru óvirkin. Staðfestast kundi somuleiðis, at Idé Møblar sum dátuábyrgdari av vakmyndatólunum ikki hevði fráboðað Dátueftirlitinum vakmyndatólini, og eigarin fekk á staðnum boð um at fráboða Dátueftirlitinum vakmyndatólini sum skjótast sbrt. § 2, stk. 3 í kunngerð nr. 31 frá 11. apríl 2005 um fráboðanarskyldu til Dátueftirlitið, sum broytt við kunngerð nr. 71 frá 2. juli 2007.

Dátuábyrgdarin fekk við brævi, dagfest 13. mai 2009 boð um, at ymisk krøv skuldu verða lokin, og eftir at hetta varð gjørt, ger Dátueftirlitið ikki meira við málið.

## 6.6. EFTIRLIT Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

Dátueftirlitið var tann 9. november 2009 á fráboðaðum eftirliti á Landssjúkrahúsinum í Tórshavn. Endamálið við eftirlitinum var fyrst og fremst at kanna trygdina fyri viðgerð av persónsupplýsing-um í sambandi við Talgildu Heilsuskipanina (THS).

**Trygdin er ikki formaliserað í leiðsluni**

Dátueftirlitið metti ikki, at tað verður arbeitt nóg skipað og miðvíst við kt-trygdini á staðnum. Seinasta útgávan av KT-trygdarpolitikkinum er frá december 2006, og gevur hetta ábendingar um, at arbeiðið við KT-politikkinum ikki er komið nakað víðari síðan hetta. Staðfestast mátti tískil, at trygdarpolitikkurin er ikki eftirmettur árliga, sum tað er ásett í § 3, stk. 4 í Trygdarkunngerðini.

Ein váðameting varð gjørd í 2005/2006, men einki er gjørt síðan. Eingin fráboðan um trygdarbrot er móttikin ella skrásett. Eingin árlig trygdarskoðan er gjørd, sum tað er ásett í § 5 í Trygdarkunngerðini.

Heilsumálaráðið hevur ikki eina formaliseraða og skipaða trygdarleiðslu, sum trygdarkunngerðin ásetur. Dátueftirlitið metti, at hesi viðurskifti geva ábendingar um, at leiðslan ikki raðfestur hendan partin av kt-arbeiðinum nóg høgt.

Dátueftirlitið kundi staðfesta fleiri brot á trygdarkunngerðina og kann hetta als ikki góðtakast. Heilsumálaráðið hevur upplýst, at ráðið hevur evstu ábyrgd av trygdini í THS-skipanini. Tað er tískil alneyðugt, at trygdin verður raðfest hægri og forankrað í leiðsluni, bæði í Heilsumálaráðnum og á Landssjúkrahúsinum.

Heilsumálaráðið fekk boð um, at senda eina frágreiðing til Dátueftirlitið í seinasta lagi 1. september 2010, har greiðast skuldi frá, hvørji ítøkilig stig eru tikin aftaná eftirlitið hjá Dátueftirlitinum, fyri at betra um trygdina sum heild í THS-skipanini.

**Trygdarbrot**

So sum THS-skipanin er uppsett, gevur hon starvsfólkum sera víða atgongd til upplýsingar. Dátueftirlitið setir spurnartekin við, um eftirlitið við nýtsluni fer fram á nøktandi hátt, eftirsum tað í ongum føri er staðfest trygdarbrot, hóast skipanin hevur verið í nýtslu í fleiri ár. Dátueftirlitið mælir til at gera skott í skipanina, soleiðis at starvsfólkini ikki hava atgongd til journalir á øðrum deildum. Um leiðslan ikki metir at hetta er gjørligt, verður mælt til at skipa og formalisera eftirlitið við nýtsluni betur.

Dátueftirlitið setti krav um, at Heilsumálaráðið ger í minsta lagi 5 mánaðarligar stakroyndir av nýtsluni hjá brúkarunum av skipanini, og skipar mánaðarliga eftirlitið við logglistunum betur.



ANNIJANNI

Dátueftirlitið

Dátueftirlitið verjir tínar persónsupplýsingar

www.datueftirlitid.fo